KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

# Klaksvíkar Býráð

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 30.06.2022 kl. 17:30 |
| **Málnr.:** | 21/01365 Gerðabók |
| Nevndarlimir: | Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig |
| Varalimir: | Andreas D. Josephsen møtti fyri Óla M. Lassen, og Herfrí J. Sørensen møtti fyri Gunvá við Keldu |
| Ikki møtt: | |
| Onnur: | Rúni Rasmussen, kommunustjóri |
| Protokollførari: | Jensa Anthoniussen, fulltrúi |

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 54/22 | 22/00197-11 | Býráðslimur tekur sæti aftur í býráðnum - Annika S. Biskopstø |
| 55/22 | 22/00124-11 | Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi (2022) - Óli M. Lassen og Gunvá við Keldu |
| 56/22 | 22/00365-1 | Arbeiði við Heimsmálunum |
| 57/22 | 22/01123-1 | Hitavekslari til svimjihøllina - *flyting millum kontur, fyrra viðgerð* |
| 58/22 | 21/01846-16 | Byggisamtyktarbroyting ísb. við íbúðabygging á Bumshamri |
| 59/22 | 21/02151-41 | Vegir, Íløgur, 2022: avseting til Gøtuljós íløgur og Vatnveiting íløgur - *flyting millum kontur, fyrra viðgerð* |
| 60/22 | 21/01954-13 | Leikvøllurin á Másheyggi - *óbrúkt játtan 2021 og eykajáttan, seinna viðgerð* |
| **Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum** | | |
| 61/22 | 22/00549-25 | Jústabrekka 1 |
| 62/22 | 22/00584-12 | Nýgerð av elsta partinum av Fjallafípuni |
| 63/22 | 21/01301-9 | Lendi til parkeringspláss |
| 64/22 | 22/00751-8 | Lendi ísv. p-pláss og alment wc |
| 65/22 | 22/01076-3 | Keyp av lendi |
| 66/22 | 22/01284-1 | Lántøkur 2022 |

**Til viðgerðar**

## 54/22
## 22/00197-11 Býráðslimur tekur sæti aftur í býráðnum - Annika S. Biskopstø

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 30.06.2022 | 54/22 |

## 22/00197-11 Býráðslimur tekur sæti aftur í býráðnum - Annika S. Biskopstø

**Frágreiðing um málið:**
Annika S. Biskopstø, býráðslimur í farloyvi, hevur boðað borgarstjóranum frá, at hon tekur sæti í býráðnum aftur frá í dag at rokna.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli:**
Býráðið verður at taka støðu til, um fortreytirnar hjá Anniku S. Biskupstø fyri at taka sæti aftur í býráðnum eru loknar.

**Klaksvíkar Býráð 30. juni 2022:**
Annika S. Biskupstøð tók sæti á fundinum.

## 55/22
## 22/00124-11 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi (2022) - Óli M. Lassen og Gunvá við Keldu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 30.06.2022 | 55/22 |

## 22/00124-11 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi (2022) - Óli M. Lassen og Gunvá við Keldu

**Frágreiðing um málið:**
Óli M. Lassen, býráðslimur, hevur 28. juni boðað frá, at hann hevur forfall til býráðsfundin 30. juni 2022. Næstvaldur á listanum er Andreas D. Josephsen.

Gunvá við Keldu, býráðslimur, hevur 29. juni boðað frá, at hon hevur forfall til býráðsfundin 30. juni 2022. Næstvaldur á listanum er Símun á Høvdanum, men honum berst eisini frá at møta. Herfrí J. Sørensen er næstvald eftir Símun á Høvdanum.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 18.

*Stk. 1.* Berst kommunustýrislimi frá at møta á kommunustýrisfundi vegna heilsustøðu, kunnu teir limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð. ... .

*Stk. 2.* Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.

*Stk. 3.* Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fundarsamsýning til tiltakslimir, um býráðið avger at lata teir taka sæti í býráðnum til fundin.

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til innkalling av tiltakslimum fyri Óla M. Lassen og Gunvá við Keldu.

**Klaksvíkar Býráð 30. juni 2022:**
Einmælt samtykt at lata Andreas D. Josephsen og Herfrí J. Sørensen taka sæti í býráðnum til fundin.

## 56/22
## 22/00365-1 Arbeiði við Heimsmálunum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Heilsunevndin | 20.06.2022 | 21/22 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 76/22 |
| 3 Mentanarnevndin | 21.06.2022 | 36/22 |
| 4 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 21.06.2022 | 35/22 |
| 5 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 21.06.2022 | 20/22 |
| 6 Integratiónsnevndin | 22.06.2022 | 4/22 |
| 7 Havna- og Vinnunevndin | 22.06.2022 | 31/22 |
| 8 Tekniska Nevnd | 22.06.2022 | 50/22 |
| 9 Fíggjarnevndin | 28.06.2022 | 37/22 |
| 10 Klaksvíkar Býráð | 30.06.2022 | 56/22 |

## 22/00365-1 Arbeiði við Heimsmálunum

**Frágreiðing um málið:**
Greitt verður nærri frá málinum í skrivi 14. juni 2022.

Sameindu tjóðir (ST) samtyktu í 2015 at heita á heimsins tjóðir um at virka fyri at fremja 17 burðardygg menningarmál, sokallaðu Heimsmálini. Málini eru sett fyri tíðarskeiðið 2015 til 2030 og skulu seta eina greiða kós fram ímóti burðardyggari menning til gagns fyri bæði menniskju og náttúru. Talan er um 17 mál og 169 undirmál.
Burðardygg menning merkir, at vøkstur og menning hevur umsorgan fyri tilfeingi, náttúru og fólki. Tvørtur um ættarlið.

Klaksvíkar kommuna hevur arbeitt og arbeiðir við burðardyggum loysnum. Besta dømið er helst verkætlanin við sjóhita (stuðlar undir Heimsmál 7). Við sjóhitaskipan er einki $CO_2$-útlát. Fimm stórir

bygningar í miðbýarøkinum verða hitaðir við sjóhita. Henda skipan er ein slóðbrótandi og grøn orkuskipan.

Harumframt kunnu Endurnýtslan, kommunala luttøkan í landsátakinum "ABC fyri sálarheilsu", átakið "Virkið vár" og ítróttardepilin í Klaksvík nevnast.

Umhvørvispolitikkur fyri kommununa bleiv samtyktur í 2017. Hann skal endurskoðast. Nógv er hent seinastu árini, og greiður tørvur er á at gera ein nýggjan, framskygdan og miðvísan umhvørvispolitikk.

Høvuðsmálið við at seta burðardygd ovast á breddan er at skapa eina enn betri kommunu fyri øll á burðardyggum grundarlagi. Vælferð og vøkstur skal koma so nógvum borgarum til góðar sum møguligt.

Dømi um øki hjá kommununi at arbeiða við: umhvørvið, býarskipan, undirstøðukervið, trivnaður og heilsa, mentan, vinnumenning, innovatión, útbúgving, veðurlag, orka og lívfrøðiligt margfeldi.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fíggjargreining er ikki tøk. Tað kostar at fremja burðardyggar loysnir, men sum frá líður eru greiðar jaligar fíggjarligar avleiðingar av at taka atlit til umhvørvið og burðardygd.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at samtykkja at arbeiða miðvíst við teimum 17 Heimsmálunum fyri burðardyggari menning. Mælt verður til at arbeiða við burðardygd og framskygni á øllum økjum í Klaksvíkar kommunu. Mælt verður øllum nevndum býráðsins til at virka fyri burðardyggari menning og atlitum á teirra økjum og at staðfesta, hvat longu er gjørt á teirra økjum. Fyrisitingin skal gera uppskot um, hvussu hetta arbeiðið kann skipast skynsamt, ítøkiligt og framskygt.

**Heilsunevndin 20. juni 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. juni 2022:**
Nevndin tekur undir við HeiN 20-06-2022.

**Mentanarnevndin 21. juni 2022:**
Mentanarnevndin tekur undir við UBN dagf. 20-02-2022.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 21. juni 2022:**
Nevndin tekur undur við MeN 21.06.2022.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 21. juni 2022:**
Nevndin tekur undir við TrN B&U 21.06.2022.

**Integratiónsnevndin 22. juni 2022:**

**Havna- og Vinnunevndin 22. juni 2022:**
Nevndin tekur undir við TrN B&U dagf. 21.06.2022.

**Tekniska Nevnd 22. juni 2022:**
Nevndin tekur undir við HaVN 22. juni 2022.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2022:**
Nevndin tekur undir við TN 22. juni 2022.

**Klaksvíkar Býráð 30. juni 2022:**
Tilmælið frá FíN 28. juni 2022 einmælt samtykt.

## 57/22
## 22/01123-1 Hitavekslari til svimjihøllina - *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Heilsunevndin | 20.06.2022 | 24/22 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 96/22 |
| 3 Mentanarnevndin | 21.06.2022 | 44/22 |
| 4 Fíggjarnevndin | 28.06.2022 | 40/22 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 30.06.2022 | 57/22 |
| 6 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | |

## 22/01123-1 Hitavekslari til svimjihøllina

**Frágreiðing um málið:**
Í skrivi frá umsitingini 14. juni 2022 verður greitt eitt sindur gjøllari frá málinum.

Ætlanin er at seta ein hitavekslara upp í svimjihøllini. Tilboð er fingið til vega frá fyritøkuni Defined Energy. Tilboðið er hjálagt, og veitingartíðin er 6-8 vikur.

Ongin annar veitari er í landinum av slíkari skipan, og prísurin er kappingarførur í mun til aðrar líknandi skipanir.

Upplýst er, at eftir 6-7 árum hevur skipanin spart seg inn aftur við verandi nýtslu. Verður nýtslan størri, er sparingin somuleiðis størri. Sostatt er yvir tíð ikki talan um eina útreiðslu.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongin avseting er til endamálið, og tí verður mælt til at fíggja íløguna við eykajáttan ella flyting millum kontur.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at nevndir og býráð taka støðu til hesa skipanina á grønu leiðini.

**Heilsunevndin 20. juni 2022:**
Heilsunevndin fegnast um, at átøk verða gjørd á grønu kósini.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. juni 2022:**
Nevndin staðfestir, at talan er um eina góða og neyðuga íløgu á grønu kósini og tekur tí undir við loysnini við hitavekslara.

**Mentanarnevndin 21. juni 2022:**
Nevndin ynskir at raðfesta, so íløga verður gjørd í hitavekslara til svimjihøllina, og mælir til, at íløgan verður fíggjað við umraðfesting á ítróttarøkinum íløga, har kr. 673.000 íroknað kommunu-mvg verða fluttar til svimjihøll íløga. Samstundis verður mælt til, at nevnda upphædd verður tikin við í fíggjarætlanina fyri 2023 innan stadionøkið íløga fyri at tryggja endaliga altjóða góðkenning av Djúpumýru í 2023.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2022:**
Nevndin tekur undir við MeN 21. juni 2022.

**Klaksvíkar Býráð 30. juni 2022:**
*Annika S. Biskopstø luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

Tilmælið frá FíN 28. juni 2022 einmælt samtykt.

## 58/22
## 21/01846-16 Byggisamtyktarbroyting ísb. við íbúðabygging á Bumshamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 78/22 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 30.06.2022 | 58/22 |

## 21/01846-16 Byggisamtyktarbroyting ísb. við íbúðabygging á Bumshamri

**Frágreiðing um málið:**
Sp/f PADO søkir um at fáa broytt byggisamtyktina ella undantaksloyvi til at sundurbýta íbúðalonirnar á Bumshamri í 12 sjálvstøguðar íbúðir, fyri síðani at selja íbúðirnar.

Somuleiðis verður søkt um matrikulsamanlegging, har matr.nr. 34c og 34d vera lagdir saman til ein sjálvstøðugan matrikul.

Tann 1. apríl 2022 fekk Sp/f PADO útskrivað byggiloyvi til lonirnar við 12 íbúðum; 6 íbúðir á 65 $m^2$ og 6 íbúðir á 130 $m^2$.
Samlaða víddin av grundstykkjunum báðum er 576 + 524 = 1100 $m^2$, sum gevur 91,66 $m^2$ vídd pr. íbúð.
Í samband við byggimálsviðgerðina eru ymisk viðurskiftir ávíst sum krav: parkering, útiøki, goymsla, byggiprocent. Hesi viðurskiftir eru komin í rættlag, og fer byggingin í gongd í summar.

Byggingin er umfatað av økisparti A15, har minsta krav til hús og íbúðir er 200 $m^2$ *(samtykt er at fara niður á 150 $m^2$, almenn hoyring um lækkan á 150 $m^2$ verður í summar)* lóggávan á økinum loyvir einans sundurbýti vísandi til galdandi byggisamtykt, og at byggi- og brunaviðurskiftini eru í ordan.

Í løgtingslóg um eigaraíbúðir v.m. undir § 10, stk. 2 stendur soleiðis:

*Stk. 2. Øll sundurbýtismál skulu sendast avvarðandi kommunu til ummælis. Kommunan skal greitt tilskila, um eitt møguligt sundurbýti ikki er í samsvari við:*

1) *lóggávuna um byggiviðurskifti og brunaviðurskifti,*
2) *eina góðkenda byggisamtykt ella býarskipan ella*
3) *lóggávuna annars.*

*Stk. 3. Verður tað í ummæli frá kommununi eftir stk. 2 ella á annan hátt upplýst, at tað við sundurbýtinum koma fram viðurskifti, sum ikki samsvara við reglurnar í teimum í stk. 2, nr. 1-3 nevndu viðurskiftum, verður sundurbýtið ikki góðkent uttan so, at avvarðandi myndugleiki hevur givið undantaksloyvi.*

Ásetingin fyri grundøkjavídd í A15 ljóðar soleiðis í dag:

**300 m$^2$ fyri vanlig sethús og 200 m$^2$ fyri samanbygd hús og íbúðir.**

Uppskot til broyting av byggisamtykt A15 ljóðar soleiðis:

**300 m$^2$ fyri vanlig sethús og 150 m$^2$ fyri samanbygd hús og íbúðir. Í serligum føri, tá ið viðurskiftini tala fyri tí, og byggingin ikki lýtur dámin á økinum, kann býráðið loyva grundøkjavídd lægri enn 150 m$^2$ fyri íbúðir, treytað av at byggingin annars uppfyllir øll krøv sambært galdandi ásetingum og reglum.**

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.
Løgtingslóg um eigaraíbúðir v.m.
Løgtingslóg um matrikul v.m

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
Tekniska fyrisiting mælir nevnd og býráð til at:

1. taka undir við samanlegging av matr.nr. 34c og 34d, so hesi verða ein matrikul,
2. játta Sp/f PADO undantaksloyvi fyri lægri grundøkjavídd eftir *løgtingslóg um eigaraíbúðir §10, stk. 3,*
3. heimila fyrisitingini at fremja byggisamtyktarbroytingina fyri grundøkjavídd í A15,
4. harvið loyva Sp/f PADO at sundurbýta hvørja íbúð niður í 90 m$^2$.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. juni 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 13-06-2022.

**Klaksvíkar Býráð 30. juni 2022:**
*Andreas D. Josephsen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

Tilmælið frá UBN 20. juni 2022 einmælt samtykt.

## 59/22
## 21/02151-41 Vegir, Íløgur, 2022: avseting til Gøtuljós íløgur og Vatnveiting íløgur - *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 22.06.2022 | 51/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.06.2022 | 42/22 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 30.06.2022 | 59/22 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 29.09.2022 | |

## 21/02151-41 Vegir, Íløgur, 2022 - avseting til Gøtuljós íløgur og Vatnveiting íløgur

**Frágreiðing um málið:**
Tekniska nevnd hevur samtykt eina raðfesting av samlaðu játtanini til *Vegir Íløgur*, har tað í dag standa 7,0 mió. kr. á fíggjarætlanini fyri 2022.

Samtykt er, at *Vatnveiting íløgur* skulu hava 400 tkr. av játtanini, og *Gøtuljós íløgur* skulu hava 300 tkr. av játtanini.

Fíggjarlig broyting:

| | |
|---|---|
| Samlað játtan til *Vegir Íløgur* - konta 06381170181 | kr. 7.000.000,- |
| Samtykt at flyta til *Vatnveiting Íløgur* – konta 06302170120 | kr. 400.000,- |
| Samtykt at flyta til *Gøtuljós Íløgur* – konta 06381270130 | kr. 300.000,- |
| Eftir til *Vegir Íløgur* – konta 06381170181 | kr. 6.300.000,- |

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin, samtykta fíggjarætlanin hjá Klaksvíkar kommunu fyri 2022.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Avleiðingin av málinum er, at samlaða játtanin til *Vegir Íløgur* minkar úr 7,0 mió. kr. til 6,3 mió. kr. Játtanin á konto til *Vatnveiting Íløgur* fer úr kr. 0,00 til 400 tkr., og játtanin á konto til *Gøtuljós Íløgur* fer úr kr. 0,00 til 300 tkr.

**Tilmæli:**
Tekniska umsiting mælir við hesum viðkomandi nevndum og býráði til at taka undir við fíggjarligu broytingini.

**Tekniska Nevnd 22. juni 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 14-06-2022.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2022:**
Nevndin tekur undir við TN 22. juni 2022.

**Klaksvíkar Býráð 30. juni 2022:**
Tilmælið frá FíN 28. juni 2022 einmælt samtykt.

**60/22**
## 21/01954-13 Leikvøllurin á Másheyggi - *óbrúkt játtan 2021 og eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 17.05.2022 | 26/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.05.2022 | 29/22 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 25.05.2022 | 50/22 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 30.06.2022 | 60/22 |

## 21/01954-13 Leikvøllurin á Másheygi - óbrúkt játtan 2021 og eykajáttan

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 25. mai 2022.

**Mentanarnevndin 17. mai 2022:**
Ein meiriluti, JCC, GvK, og RJ, tekur undir við tilmælinum, dagf. 06.05.2022
Ein minniluti, SVJ, tekur støðu í býráðnum.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2022:**
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við at framflyta 10 mió.kr. og at veita eina eykajáttan á 8,1 mió.kr. (vísandi til notat, dagf. 23-05-2022, frá vinnu og mentanarstjóranum); eykajáttanin verður fíggjað við lántøku.

TJL tekur støðu í býráðnum

**Klaksvíkar Býráð 25. mai 2022:**
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá SVJ: "*Mælt verður til, at 7 mió. kr. verða fluttar av íløgujáttan fyri 2022*"; tað fall við 2 atkvøðum fyri (SVJ og TJL) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og RJ). ÓML og ADJ atkvøddu ikki.

Atkvøtt varð síðani um meirilutatilmælið frá FíN 23. mai 2022; tað varð samtykt við 10 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, RJ, ÓML, TJL og ADJ) og ongari ímóti. SVJ atkvøddi ikki.

**Klaksvíkar Býráð 30. juni 2022:**
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá SVJ: "*Mælt verður til, at 7 mió. kr. verða fluttar av íløgujáttan fyri 2022*"; tað fall við 4 atkvøðum fyri (SVJ, TJL, JS og ADJ) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, HJS, OáL, JCC, EÓP og ASB).

Atkvøtt varð síðani um tilmælið frá BýR 25. mai 2022; tað varð samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, HJS, OáL, JCC, EÓP, ASB, TJL og ADJ) og ongari ímóti. SVJ og JS atkvøddu ikki.

**FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**

**61/22**
**22/00549-25 Jústabrekka 1**

**62/22**
**22/00584-12 Nýgerð av elsta partinum av Fjallafípuni**

**63/22**
**21/01301-9 Lendi til parkeringspláss**

**64/22**
**22/00751-8 Lendi til p-pláss og alment wc**

**65/22**
**22/01076-3 Keyp av lendi**

**66/22**
**22/01284-1 Lántøkur 2022**

Fundur lokin kl. 20:45